

MYND: JENS KRISTIAN VANG

**FAKTA BJØRGHILD DJURHUUS**

**Aldur:** 57
**Familja:** maður, trý børn og fýra ommubørn
**Bústaður:** Argir
**Starv:** Heilsufrøðingur og ráðgevi í egnu fyritøkuni Tvinna - www.tvinna.fo

**Dømir uppá spurningar sum Bjørghild hevur svarað í Góðan morgun Føroyar**

## Hvussu fyrireiki eg ein 3 ára gamlan uppá at blíva stórabeiggja?

*Eg eri uppá vegin og skal eiga skjótt. Eg eigi ein son sum er 3 ár og havi fortalt honum at hann skal blíva stóribeiggi, og hann gleðir seg. Men eg skilji, at hann ikki skilur, hvat hetta inniber. Hvussu fyrireiki eg hann best uppá hetta?*

Tað er torført at fyrireika hann upp á at gerast stóribeiggi. Tað, sum tú kann gera, er at fortelja søgur um stórabeiggjar og um nýføðingar. Hugsa um, at tað skal vera á hansara støði.

Fyrireika hann eisini upp á, at tað ikki er ein spælivinur, hann fær, at lítlibeiggi ikki dugur at snakka og ikki at spæla. Tosa við pápan um, at teir báðir kunnu gera okkurt saman, tá tú verður upptikin av tí lítla

Tá barnið er trý ár, kann tað at fáa syskin upplivast sum at fáa ein konkurrent, ið er komin. Øvundsjúka er natúrligt í hesum, og hann má vita, at tað er í lagi at vera súrur, men hann má ikki sláa.

Trý ára gomul kunnu blíva meir »babyslig« av at fáa lítil syskin. Tey kunnu byrja at brúka suttu og blæðu aftur, hóast at tey eru givin við tí.

Henda tíðin, tá eitt nýføtt er komið inni í familjuna, er ikki rætta tíðin hjá tí trý ára gamla at flyta út úr kamarinum ella gevast við nøkrum.

Hóast tú verður upptikin, so royn at gera okkurt av tí, sum tit bæði høvdu saman, áðrenn lítlibeiggi kom.

Lat hann verða heima í barnagarðinum og merkja eitt sindur av fríheit, um hann vil tað. Annars kann barnagarðurin eisini fungera sum eitt frírúm hjá honum, tí har er alt líka.

Minst altíð til at systkin eru ein gáva, vit geva børnunum.

*Góða eydnu!*

## Hví hava skúlarnir ikki kantinu?

*Flestu arbeiðspláss hava eina kantinu. Hví raðfestir man ikki at hava eitt rúm, har børnini í skúlunum kunnu eta sín matpakka? Nú verða tey noydd at sita í trongu skúlastovuni og eta matpakkarnar?*

Eg gevi lurtarnum fullkomiliga rætt – vit vaksnu høvdu ikki funnið okkum í tí, sum er gerandisdagur hjá børnunum. Skúlarnir liva enn í tí, at børnini skulu heim í døgverðatíma og hava ikki fylgt við, nú hetta er broytt og børnini eta matpakka í skúlanum. Eg haldi, at ein kantina burdi verið til staðar, áðrenn tann skipanin varð broytt. Tað er væntandi virðing fyri børnum og ungum at ikki hava eina kantinu. Foreldrabólkar kundu kanska gørt vart við seg í hesum máli. Men vit kunnu ikki bíða, til nýggir skúlar verða bygdir. Hetta má raðfestast nú. Kanningar vísa eisini, hvussu nógv tað hevur at siga fyri innlæringina, at næmingar fáa góðan mat at eta.

Umstøðurnar føroyskir næmingar hava, fremja ikki hetta.

Tað optimala hevði verið at havt eina kantinu, har børnini eisini høvdu møguleika at keypa sær ein sunnan matpakka.

*Góða eydnu!*